

*Tá teir miðskeiðis í fimmtiárunum løgdu Havnará undir heilt á Tinghúsvøllinum. Nøkur ár framman undan varð hon løgd undir fram við Áarvegnum niðan til Tinghúsvegin*

synirnar. Tá ið eg sum óviti kom úr Skúgvi til Havnar at ferðast og búði hjá ommu, varð eg av Regini, tí yngsta soninum hjá Ásmundi, og øðrum garpum av Abbatrøð førdur inn í koboyverðina. Sum bygdadrongur, við munandi størri vitan um Karlamagnus, Olgar Danska og Regin smið enn um amerikanskar neytadreingir, fekk eg ein ofta heldur eyðmjúkan leiklut í kovoyspælinum. Men eg haldi meg minnast, at Regin ofta hevði leiklutin sum Hopalong Cassidy, og at hann spældi hesa rollu á sera sannførandi hátt. Um Ásmund er at siga, at hann var fámæltur maður og púra sørur fyri stjóralótir.

Sum arbeiðsmaður hjá Ásmundi Poulsen upplivdi eg einaferð, hvussu ein samanbrestur millum, øðrumegin mentan og søgu, og hinumegin handil og peningavald, kundi arta seg. Ein danskur møblahandilsmaður hevði keypt eitt grundstykki úti á Skúlareyni, har hann ætlaði at byggja handil ella goymslu. Stykkið var tað, sum rópt varð Hans Olsens Havi, vestan fyri Snikkarastovu og húsini í Tranti. Ásmund Poulsen stóð fyri arbeiðinum, og farið varð undir at grava út. Grivið varð tætt yvir at Snikkarastovu. Í beninum, haldi eg meg minnast, sást, at hesi gomlu húsini vóru ikki bygd á fastan botn, men stóðu á loddrættum stólpum, sum so aftur stóðu á bóndatrøum, ið vóru løgd vatnrætt djúpt niðri í moldini ella leirinum.

Sum ivaleyst mongum kunnugt vórðu pokurnar bornar til Havnar av tí seinasta skipinum, sum var í Føroyum á heysti 1709. Farsóttin gjørdi rættiliga feigdina um seg. Tríggir fjórðingar av íbúgvunum á býnum — tilsamans 250 fólk - doyðu av sjúkuni. Av teimum 35, sum mannaðu Skansan, doyðu 3 korporálar og 22 hermenn. Somuleiðis doyðu tey flestu skúlabørnini og 12 av 15 sjúklingum á Spitalinum á Argjum.

Í Hans Olsens Hava var Pokuholið, og fólk hildu seg vita, at pokugravir vóru á hesum stað. Myndugleikarnir komu upp í málið, og vit arbeiðsmenn, sum høvdu ábyrgd av at fáa alt tað frá hondini, sum gravimaskinan ikki formáddi, kundu eygleiða, hvussu smáar Føroyar vóru. Um tað lítla arbeiðsplássið tyrptust eina stutta tíð landsins fornfrøðingur Sverri Dahl, landsins jarðfrøðingur Jóannes Rasmussen, umboð fyri friðingarnevndina og til endans eisini løgmaður sjálvur — sum um hetta mundið var Hákun Djurhuus.

Stakroyndir vórðu tiknar, Sverri og Jóannes, løgmaður og friðingarmenn tutlaðu og tingaðust, her varð fregnað og kannað, snýst og fýst. Í Snikkarastovu og Barnastovu, hjá Júst og á Bakkahellu stóðu fólk og skottaðust. Jarðarmunurin var nógvur og útgrevsturin av tí sama meira enn manshædd djúpur eystarumegin. Tá ið Maddikk kom út fyri dyr, hvítklæddur og í seðlum, at spyrja, hvussu leikur fór, sá hann út sum skiparin á brúnni. At enda var tað, sum øll verðin bíðaði eftir, at ræið av onkrum ólukkudýri frá tí ræðuliga farsóttarárinum 1709 fór at koma undan. Men tað var alt eitt stórt vónbrot. Ikki eitt einasta mannabein varð funnið í Hans Olsens Hava. Burtur úr hóvastákinum kom kortini tað góða, at forboð varð sett fyri bygging á hesum stað.

TÍÐARSKEIÐIÐ EG av og á hevði leiklutin sum arbeiðsmaður í Havn fevnir um árini 1956 til 1973, við øðrum orðum frá tí Suezkreppan tók seg upp, og til Augusto Pinochez bardi niður fólkaræðið í Chile. Tilsamans man eg hava arbeitt hjá einum 10-12 ymiskum størri og smærri virkjum, teirra millum eisini eitt nú Bacalao, Pihl & Søn og Lamhauge & Waagstein. Hesi árini varð tann nýggja Havnin til. Stoffalág, Rættará, Heyggurin Mikli og líðirnar niðan fyri Marknagilsvegin vórðu lagdar undir betong og asfalt.

Arbeiðið við spaka í hond, ella uppi yvir blandimaskinuni, var ikki altíð líka týdligt. Tað kundi vera bæði tungt, skittligt, møðsamt og eintáttað, ikki minst á vetri, tá ið vesturættin lá so trá, og regnið díkti niður í mánar. Oljuklæðini tyngdu, og heilin var ikki annað enn mold og sement.

Tað kundi lætta um arbeiðið, tá menn fóru at práta ella tingast um okkurt ávíst. Høvuðsevnini í slíkum orðadráttum vóru trý: mál, átrúni og politikkur. Drúgvast vóru orðaskiftini, um umboð fyri øðrumegin fólkakirkjuna og hinumegin Brøðrasamkomuna brustu saman. Hvat meinti Jesus í grundini, tá hann á sinni bar møguleikan fyri frelsu saman við eitt nálareyga? Hvat veitir rættvísgering — trúgvin ella gerðin? Á hittlistanum yvir mest umrøddu persónar á føroyskum arbeiðsplássum hevði Paulus lættliga skorað fyrstaplássið.

Slík orðaskifti kundu eisini gerast leiðilig, minna um at ganga í kyksendi, ella um javnfjarar linjur. Ein visti, at tey kundu halda á til dómadags, uttan at ein niðurstøða tektist. Sjálvur ivist eg ikki í, at um hesir gudfrøðiligu moldhólkar og orðklúgvarar komu í himmalin, høvdu teir eisini har hildið fram við sínum orðadrátti um gerðina og náðina, til slíkan ampa fyri bæði Várharra og einglarnar, at himmalsins Petur Michelsen at enda hevði læst teir inni í onkrum serligum, ljóðvardum kliva.

Ein skái av øðrvísi slag kundi koma innanífrá. Brádliga kundi ein, mitt í arbeiðinum, uppliva løtur, ið høvdu yvir sær okkurt opinberingarkent, tað var sum sálin, eins og ein mortítlingur, smeyg sær út um tann holdliga veruleikan, út um vætu, runuvatn, mógv, út um útsynning og oljuklæðir. Ein var á lívi hóast alt. Vakrar kvinnur vóru til. Heima bíðaði ein nýggj pláta eftir Leonard Cohen.

ØLL HESI árini hevði hugurin til at brúka pennin javnan gjørt vart við seg. Sum mangir av mínum javnaldrum royndi eg meg fyrstu ferð í Vitanum, tí lítla blaðnum, næmingar á Preliminer- og Studentaskúlanum góvu út. Seinni komu av og á greinir, lesarabrøv og stubbar á prent í eitt nú Oyggjaskeggja, 14. September og Dagblaðnum.

Fyrimyndirnar vóru frá fyrstu løtu greiðar. So skjótt eg av álvara fór at lesa tekstir, ið bóru av eitt nú Dumas ella Captain Marryat, visti eg, at Guy de Maupassant og Herman Bang vóru heimsins fremstu prosaistar. Seinni komu onnur aftrat: Kafka, Borges, Nabokov, Karen Blixen.

Eg fari at loyva mær, móti endanum, at gera eitt lítið slank. Eg minnist, hvussu merkiligt tað var fyrstu ferð at standa við tí lítlu bókini *Tvär smásøvur äv Guy de Maupassant sættar út uppá førist*, Tórshavn 1891, sum eg fekk til gávus frá Inga Mohr, helst í 1956 ella 1957. Tað hevur altíð undrað meg, at eingin føringur hevur spurt seg sjálvan, hvat kundi komið burtur úr Jakob Jakobsen, um hann var farin tann franska vegin, hevði valt skaldskapin og naturalismuna heldur enn málfrøðina og Nólsoyarpáll.

Hvat var so læran av øllum hesum? Eydnaðist tað nakrantíð at sameina penn og spaka? Tað er helst ilt at siga. Eingin grund er til at sveipa eins stokkutu løtur uppi yvir spakanum inn í romantiskt pynt, hvørki av idealistiskum ella proletariskum slag. Arbeitt varð, tí ein hevði brúk fyri pengum, ella tí tað var skomm at ganga fyri einki.

Aftaná tykist kortini greitt, at eisini okkurt annað kom burturúr. Onkustaðni, aftarlaga í vitskuni, hevur ant ein longsul, kámur og kortini seigur, eftir møði og sveitta, eftir at royna sín kropp, eftir at gróðurseta sín anda í djúpum lendi. Úrtøkan var, um væl visti til, at okkurt slag av javnvág, kanska enntá eyðmýkt, kom í sálina. Og hvat ein annars kann siga, so var harðliga brúk fyri hesum eginleikum.




*Hendan myndin, sum er frá umleið 1974, vísir, hvussu nógv ferðslan øktist í »nýggju Havnini«. Hetta førdi við sær, at Havnin var eitt stórt byggipláss í nógv ár*



# Danskur tónleikur heiðrar seg sjálvan

Mikudagin 5. desember hittust fólkini, ið mynda danskan popptónleik, og fólkini handan tónleikarásina P3 hjá Danmarks Radio fyri at heiðra hvønn annan og seg sjálvan framman fyri fimtanhundrað áskoðarum í Falconersalinum á Fredriksberg í Keypmannahavn og nøkrum hundraðtúsund útvarpslurtarum. Sosialurin var við á fremsta bonki





TÓNLEIKUR
*Rúnar Reistrup*

Teir eru her allir, tónleikararnir, sum hetta seinasta árið hava fylt airplay listan hjá donsku lurtaragjaldsgoldnu tónleikarásini P3 hjá Danmarks Radio. Høvið er stórfingna heiðurslønarhandanin, sum undir navninum P3-Prisen hevur verið lýst, júkað og aftur lýst í ein heilan mánað, serliga á P3, men eisini alla møguliga aðrastaðni. P3-Prisen er nýggja árliga høvið hjá donskum popptónleiki at heiðra seg sjálvan, og eftir uppmøtingini at døma, er hetta høvið vælkomið millum kendar danskar tóleikarar.

At tað júst er P3, sum hevur tikið stig til hesa heiðran, er ikki tilvildarligt. Helvtin av teimum tónum, sum væl umtókta útvarpsstøðin sendir út, eru danskir, og tí hevur P3 rættiliga stóra ávirkan á, hvørjir danskir tónleikarar koma fram í ljósið. So P3-Prisen snýr seg kanska líka nógv um, at danskur popptónleikur heiðrar P3.

FLATT AV FLATLONDUM
Falconersalurin á Fredriksberg er fyltur á tremur av kendum og minni kendum tónleikarum, fjølmiðlum og einari fjøld av fólki, ið hevur tikið djúpt niður í lumman fyri at sleppa við. Stóri spurningurin tygara útsendi setti sær sjálvum á veg inn í salin er, um danskur popptónleikur veruliga hevur so nógv at feira í løtuni, at tað er vert alt hetta stríðið. Eitt skjótt afturlit at tí, sum hevur verið at hoyrt á P3 hetta seinasta árið, fekk meg at ivast í um popptónleikalandslagið her á flatlondum ikki er nakað flatt.

Tak til dømis ein teirra, sum hevur verið einamest at hoyrt hendan seinasta mánaðin, 80'ara popparan Thomas Helmig, sum júst hevur uppfunnið seg sjálvan fyri guð viti hvørja ferð nú undan jólunum og sent eina fløgu út við nøkrum, sum í besta føri kann kallast lítið sigandi honningspoppur. Helmig var nomineraður til eina heiðursløn, men fekk onga.

Og so er tað Tim Christensen, fyrrverandi sangari í kenda fyrrverandi danska rockbólkinum Dizzy Miss Lizzy, sum í ár reisti seg frá gloymskustøvinum við einari solofløgu í stórt sæð sama stíli sum Dizzy Miss Lizzy fløgurnar. Tim Christensen vann heiðurslønina fyri at eiga mest spælda lag á P3 hetta farna árið.

Til teir meira frægu hoyrir Erann DD, funktónleikarin, sum í fjør knappliga bleiv poppari og síðan hevur verið at hoyrt hvønn dag á P3. Tað sama var galdandi fyri Útvarp Føroya, tá Erann DD legði leiðina framvið Høllini á Hálsi í august í ár. Erann vann heiðurslønina »Årets P3 kunstner«, ið varð givin til tann tónleikaran, ið hevur verið mest spældur á P3 hetta seinasta árið.

MEN EITT ER tónleikarar, sum enduruppfinna seg sjálvar og liva upp á, at fólk enn ikki hava gloymt teirra fortíðar avrik. Verri er tað, at fólk, sum hvørki hava verið, ella nakrantíð fara at gerast, góðir tónleikarar mynda danska poppallin í løtuni. Ringasta dømið um hetta er gentbólkurin EyeQ. Bólkurin er sjálvt úrslitið av sera vælumtóktu sendingini »Popstars« á sjónvarpsrásini TV2, har ungar gentur úr øllum landinum, ja øllum ríkinum, telur man føroyska innslagið við, kappaðust um at gerast partur av einum gentubólki. Við tímalangum sjónvarpssendingum, pinup kalendarum, bókum, videoløgum og einari rúgvu av airplay hevur miðlaapparatið handan Popstars konseptið fingið gentubólkin upp á donsku popptindarnar. Tíbetur fyri danskan popptónleik, eru genturnar ikki nomineraðar til nakra P3-heiðursløn.

TAÐ ER EIN ONNUR miðlaframleidd poppvøra hinvegin. Við síðuna av mær situr tann í Danmark so víðargitni ungi maðurin Christian, sum hvørt mannsbarn hevur kent við fornavni, síðan hann fór inn í eitt hús fylt við myndatólum og lat allar landins sjónvarpshyggjarar fylgja honum í øllum lívsins viðurskiftum í væl umtóktu sjónvarpssendingini Big Brother.

Í Big Brother húsinum spældi hann upp á guitar, og eftir at hann saman við tveimum øðrum luttakarum eina náttina rýmdi úr húsinum í fylliskapi, fór hann í gongd við at stápla sær eina tónleikakarrieru á beinini. Hann innspældi eitt lag, sum onkur annar hevði gjørt, og áðrenn hann visti av, var hann ein landaplága alt summar við lagnum »Du kan gøre hvad du vil«. Síðan hevur hann lænt eitt lag hjá svianum Patrik Isakson og hetta lagið er nú at hoyra í einari danskari útgávu á P3 hvønn einasta dag. Christian vann lurtaraheiðurslønina hjá P3 fyri at tað ikki skal vera lygn.

MEN TÍBETUR fyri P3, danskan popptónleik og tann vanliga útvarpslurtaran, so vóru tað ikki bara avdankaðir tónleikadinosaurar og miðlaskaptar døgnflugur, ið blivu heiðraðar. Tær báðar mest týðandi heiðurslønirnar á skránni fóru nevniliga til tveir tónleikabólkar, sum veruliga hava nakað nýtt at bjóða donskum tónleiki. P3-prisen, sum eisini inniber 75 túsund krónur og tvær vikur í upptøkuhøluum hjá Danmarks Radio, varð latin melodiøsa rockbólkinum Saybia, sum uttan iva fer at vera nógv at hoyra komandi tíðina.

Tann kanska mest áhugaverda av heiðurslønunum, ið P3 lat hetta kvøldið, var MP3-prisen. Fimm bólkar, sum enn ikki hava fingið sáttmála við nakað plátufelag, men sum í vón um at verða »funnir« bjóða øllum at ogna sær teirra tónleik ókeypis ígjøgnum internetið, vóru nomineraðir. Vitjandi á vevsíðuni hjá P3 valdu áhugaverda bólkin Carpark North sum vinnara av MP3-prisen.

HVAT VIÐ FØROYSKUM BÓLKUM?
Aftaná at hava verið vitni til hesa fyrstu tónleikaheiðranina hjá P3 og hava hoyrt eina løgna blanding av nøkrum tí ringasta og nøkrum tí frægasta, sum danskur poptónleikur hevur at bjóða, rennur føroyskur popptónleikur mær í hug. Høvdu føroysku bólkarnir havt nakran kjans millum teir donsku?

Og svarið er avgjørt ja, sjálvandi. Hví skuldu teir ikki havt tað? Men tað tekur tíð og krevur arbeiði. Bólkurin Saybia, sum hetta kvøldið bleiv útróptur sum størsta nýggja talentið í donskum popptónleiki, hevur seinastu árini verið alt landið runt fleiri ferðir og spælt á einum ótali av smærri spælistøðum og soleiðis spakuliga uppbygt sær ein lurtaraskara. Ikki fyrr enn í ár hevur hetta rættiliga givið úrslit, fyrst við einari framførslu á Camping scenuni á Roskilde Festivalinum, síðan við einum plátusáttmála við EMI, og nú við at vinna størstu heiðurslønina frá P3. Men enn er eitt møguligt altjóða gjøgnumbrot langt frammi í tíðini.

So føroyskir tónleikabólkar skulu helst ikki seta nøsina alt ov høgt alt ov tíðliga.